gult10 cyan10 magenta10 svart10

gult11 cyan11 magenta11 svart11



## Minni av hvali at síggja

Rogvi Mouritsen av Fiskiransóknarstovuni. stóð heilar 92 tímar uppi á brúgvatakunum á " Magnusi Heinasyni" í mai og hugdi eftir hvali og han sá ikki líka nógvar í ár, sum hann hevur sæð undanfarin ári. Men í fjør viðraði eisini betri. "Magnus Heinason" var á rannsóknarferð og kannaði sild og svartkjaft og samstundis nýtti teir esini møguleikan at telja hval. Sýnið var vánaligt , darvað av illveðri, regni og mjørka

Talt varð 92 tímar í 21 dagar, móti 113 tímum og 22 døgum í 2000. Líkindini at síggja hval vóru ring. Tað vóru gjørdar 39 observatiónir við umleið 109 hvalum. Í fjør vóru tølini 83 og 287. Eingin grind var at síggja. Siglingarleiðin í ár varð nakað broytt í mun til í fjør.

## ES varðveitir 12 fjórðinga markið

Ein partur av felags fiskivinnupolitikkinum í ES er at varðveita 12 fjórðingamarkið. Hetta merkir at innanfyri 12 fjórðingar hjá tí einstaka strandalandinum sleppa hini limalondini ikki at veiða. Hetta var samtykt í europatinginum í Strassbourg hósdagin.

Ein meiriluti avkvøddi fyri broytingaruppskotinum hjá skotska europatingsliminum Patricia McKenna og uppskotið tryggjar at 12 fjórðingamarkið verður varðveitt eftir at nýggi fiskivinnupolitikkurin hjá ES verður endurskoðaður.

-Hetta er eitt tydningarmikið stig fyri at tryggja rættindunum hjá skotskum fiskimonnum, segði Patricia McKenna aftaná at tað var greitt at tingið tók undir við hennara uppskotið.

## Størri veiðutrýst á Flemmish Cap



*"Ocean Pride" er ein av nýggju føroysku trolarunum á Flemmish Cap*

Heimsfevnandi vevsíðan FIS.com skrivar við Interseafood sum keldu, at veiðutrýstið er økt munandi á Flemmish Cap. Øll lond, undantikið Ísland, hava økt um veiðuna seinasta árið. Serliga er tað Noreg, sum hevur fleiti skip á leiðini. Men Noreg er kanska mest sjónligt, tí undanfarin ár hava beri eitt til tvey norsk skip verið á Flemmish Cap.

Hinrik Hringsson, skipari á íslendska rækjutrolaranum "Sunna" er endurgivin fyri at siga í Fiskifrettum, at veiðutrýstið ikki hevur verið størri síðan 1996. Hann sigur at tað serliga eru fleiri norskir rækjutrolarar, írokna stóra trolaran "Remoy Viking", sum roynir við trýtroli og eisini føroyingar hava økt um flotan.

Hinrik Hringsson sigur, at økta veiðutrýstið hevur eisini ávirkað veiðuna. Dagliga veiðan í dag liggur millum 5-8 tonns, meðan hon fyri einum ári síðan lá millum 10-13 tons.

"Sunna" hevur gjørt tríggjar rækjutúrar í ár og veiðan hevur ligið millum 150-260 tons. Teir hava higartil veitt 600 tons.

Íslenfingar hava ikki fiskidagar á Flemmish Cap, men eiga eina kvotu upp á 10.000 tons.

# Lítið at fáa av lodnu

NÓTABÁTAR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Krúnborg aftur við fullari last av svartkjafti*

Meðan føroysku svartkjaftabátarnir, sum nú royna í íslendskum sjógvi hava rokfiskiskap, er smáligt hjá føroysku lodnubátunum, sum royna í Eysturgrønlandi. Føroysku bátarnir í Eysturgronlandi eru "Finnur Fríði, "Saksaberg" og "Jupiter". Tepir hava havt nøkur køst, men ongantíð fingið nakað av týdningi. Fleiri danskur nótabátar eru eisini á leiðini.

Hinvegin, so gongur gott hjá nótabátunum sum royna eftir svartkjafti. Á havsbrún vóru teir akkurát lidnir at landa Christian í Grótinum um middagsleitið mánadagin. Veiðan vá 2100 tons. Og tá Christian var liðugur, legði Krúnborg at fullastað við 2600 tonsum. Svartkjaftabátarnir royna beint vestur av Føroyum í íslendskum sjógi á eini leið kallað Rósingarðurin.

### Met inntøka í nótaflotanum

Teir sum sigla við nótabátunum hava ongantíð fortjent so nógvan pening sum nú. Føroysku nótabátarnir hava fingið væl í ár og prísurin hevur eisini verið góður. Tað er ikki óvanligt, at dekkarar umborð á nótabátunum vinna 100.000 krónur um mánaðin.

Og útlitini fyri góðum prísi ger framtíðarvánirnar hjá nótamonnunum góðar. Eitt norskt felag bjóðaði í seinastu viku 7,50 fyri eitt kilo av sild. Hetta er sild, sum skal saltast og seljast sum matjesild í Hálandi og í Týsklandi.

Føroysku nótabátarnir eru framvegis á svartkjaftaveiðu í íslendskum sjógvi og onkur er klárur at fara á lodnu í Eysturgrønlandi. Men har hevur verið smáligt higartil.

# 800.000 tons av svartkjafti undir Føroyum í mai




*Magnus Heinasson sá nógvan svartkjaft í mai*

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Kanningar hjá "Magnus Heinasyni" frá 5-30 mai í føroyskum sjógvi við við ekkóintegratori sýndu, at eini 800.000 tons av svartkjafti var í føroyskum sjógvi um hetta mundi.Ein helvt av svartkjaftinum var sunnanfyri oyggjarnar og hin helvitin norðanfyri og eystanfyri.

"Magnus Heinasson" kannaði svartkjaf og sild í føroyskum sjógvi og fann eisini stórar nøgdir av svartkjafti í Norska havinum. Føroyska fiskirannsóknarskipið luttók í eini kanning saman við skipum frá fleiri øðrum londum, eitt nú Noregi og Íslandi og úrslitini skulu nýtast á einum fundi millum fiskifrøðingar, sum verður hildin um miðjan august í Reykjavík.

# Sildin fer bara longur norður

Sildin hevur flutt seg longur og longur norður síðani hon byrjaði at ferðast út í Norskahavi. Í 1995 var nógv fiskað í føroyskum øki, men tey seinnu árini er einki fiskað hjá okkum. Í 2001 sær út til at sildin er farin enn longur norður, og eisini er líkt til at nøgdin er minkað. Her skal tó gerast vart við, at óvissa er um nakað av sild stendur millum svartkjaftin á djúpum vatni. Umframt svartkjaft, kom sild ofta í trolið, tá tóvað var á 300-350 m dýpi. Annars stóð sildin vanliga ovari enn svartkjafturin, Hetta er úrslitið av sildakanningunum, sum "Magnus Heinason" gjørdi norðanfyri Føroyar í mai.

Sild sást ikki fyrr enn norðuri á umleið 69°N, og norður á 73°N, í einum øki millum 3 til 9-10°E. Tættleikin og støddin á stimunum minkaði vestureftir móti 3°E. Sildin helt seg frá køldum sjógvi norðan- og vestaneftir . Longd og vekt á sildini var um 35 cm og knapt 300 g.



Ítróttarhøllin í Kollafirði:

# Fangað í politiskum spæli

**Arbeiðið uppá eina nýggja ítróttarhøll í Kollafirði hevur staðið stilt síðani ársskiftið. Íløgukarmarnir hjá Tórshavnar Býráð eru eftir øllum at døma vorðnir ov trongir. Kollfirðingar eru ørkymlaðir um støðuna**

ÍTRÓTTARHØLL
*Heri á Rógvi*



*Kollfirðingar eru ørkymlaðir, nú arbeiðið við ítróttarhøllini er steðgað upp. Sambært trivnaðarstjóranum í Tórshavnar kommunu verður nýggj bygginevnd sett í næstur*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Tað var fyri góðum tveimum árum síðani, at kollfirðingar kundu fara at gleða seg til eina nýggja stásiliga ítróttarhøll. Síðani tá er Kollafjørður farin upp í Tórshavnar Kommunu.

Arbeiðið fór fram við rúkandi ferð til seinasta ársskiftið. Síðani tá hevur einki arbeiðið verið gjørt. Arbeiðið at spreingja er sum skilst mest sum liðugt, so tað einasta kollfirðingar í dag hava møguleikan at síggja er eitt stórt næstan slætt grúsøki, har tað fyrr var bøur.

Kollfirðingar kenna seg ørkymlaðar av støðuni. Skúlastjórin í Kollafirði, Karin Hammer, sigur seg ikki vita nakað um lagnuna hjá komandi ítróttarhøllini í kollafirði.

### Skúli og høll

Upprunarliga ætlanin var at byggja eina ítróttarhøll, og síðani skuldi skúlin hýsa nøkrum serstovum í kjallaranum. Tað var ongantíð ásettur nakar dagur sum høllin skuldi verið liðug. Eftir hvat skilst á tí upprunaligu bygginevndini, so var gekk verkætlanin í sínari tíð út uppá, at ítróttarhøll og kjallari við umklæðingarrúmi og einari smíðstovu skuldi gerast. Kjallarin skuldi verið liðugt stoyptur, soleiðis at klárt var at innrætta hann til skúlabrúk.

Hans Jacob Simonsen, sum var formaður í upprunaligu bygginevndini fyri høllina, sigur, at kostnaðurin varð mettur at liggja um einar 20 mill. fyri upprunaligu verkætlanina, og samlaði kostnaðurin, tá allur kjallarin var innrættaður skuldi vera 30 mill. Eftir hvat Sosialurin skilir, so hevur verið kjakast aftur og fram um, í hvussu stóran mun skúlin í Kollafirði skal húsast í nýggju ítróttarhøllini. Verkætlanin er nú yvirtikin av Tórshavnar Býráð, men býráðið í høvuðsstaðnum hevur tó verið við í verkætlanini frá byrjan.

Jákup Suni Joensen, býráðslimur, sigur, at tey tøl sum býráðið hevur fingið at arbeiða liggja væl oman fyri tey upprunaligu tølini millum 20 og 30 milliónir. Jákup Suni Joensen sigur víðari, at tað verður trupult at gera eina sovorðna høll innan fyri verandi íløgukarmar. Eisini er tað ein spurningur um raðfesting av íløgum, sigur Jákup Suni Joensen.

### Nýggj bygginevnd

Hans Jacob Simonsen, formaður í upprunaligu bygginevndini, heldur tað vera løgið, at kostnaðarmetingar eru farnar so nógv upp seinastu tíðina. Hans Jacob Simonsen vísir á, at tann komandi ítróttarhøllin í Hoyvík verður mett at skula koma at kosta einar 7-8 milliónir. Hóast verkætlanin í Kollafirði er nakað størri, so heldur Hans Jacob Simonsen ikki, at tað er nakað høpi í teimum metingunum, sum hava ligið um hálvthundrað milliónir.

Hans Jacob Simonsen sigur seg bert kunnu ásanna, at arbeiðið upp á ítróttarhøllina hevur ligið stilt síðani ársskiftið, og lagnan hjá ítróttarhøllini verður avgjørd í einum politiskum spæli. Bólturin liggur hjá Tórshavnar Býráð, sigur Hans Jacob Simonsen, samstundis sum hann vísir á, at ein greið kostnaðarmeting fyriliggur frá einum byggifelag.

Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóri í Tórshavnar Kommunu, sigur, at tað er rætt, at arbeiðið er steðgað upp. Orsøkin til hetta hevur serliga við íløgukarmarnar hjá kommununi at gera. Hon sigur víðari, at býráðið leingi hevur havt málið liggjandi, og ætlanin er at seta eina nýggja bygginevnd, sum skal endurskoða verkætlanina.

Málið hoyrir undir mentamálanevndina hjá Tórshavnar býráð, og eigur henda nevnd at koma við einum tilmæli. Henda nýggja bygginevnd skuldi, sambært Gunnleyg Durhuus, havt verið sett áðrenn summarfrítíðina, men verður væntandi sett í august. Enn er ov tíðliga at siga, hvør kemur at manna nevndina, umframt at tað ikki heilt ber til at siga, hvønn arbeiðssetning nevndin fær at virka undir.

Tað verður so eftir øllum at døma ein komandi bygginevndin, sum í fyrstu atløgu sleppur at avgera, nær kollfirðingar sleppa at spæla sær í nýggju ítróttarhøllini.

# Ungdómsleiðarar fingið leiðsluútbúgving

**Føroya Ungdómsráð hevur skipað fyri barna- og ungdómsleiðaraútbúgving – og 23 fólk hava lokið prógv**

UNGDÓMSLEIÐARAR
*Føroya Ungdómsráð*



*Tey, sum fingu prógv, eru: Føroya Ungdómsráð: Andrea Eldevig, Niklas Winther, Johan C.Z. Nielsen. Føroya Skótasamband: Maria Olsen, Oluf P. Joensen, Allan Mortensen. KFUM-skótarnir í Føroyum: Rúni Thomsen, Arnold Hvalsrætt, Kirsten Danielsen. Føroya KFUK-skótar: Elin Lindenskov, Rúna Egholm, Lisa Danielsen. KFUM og KFUK: Louisa Niclasen, Vemund Svendsen, Jóannes J. Østerø. Landsfelag Føroyinga í Útbúgving: Vígdis Kristiansdóttir, Turid Christophersen. Margarinfabrikkin: Lise Larsen, Karl Anton Klein. Sosialistiskt Ungmannafelag: Maria Johannesen. Unga Tjóðveldið: Regin T. Midjord, Rúni Nilelsen, Jógvan Philbrow.*

23 barna- og ungdómsleiðarar, sum eru úr 10 ymiskum felagsskapum, hava í vetur luttikið í Ungdómsleiðaraútbúgving FURs, sum umfatar 4 vikuskiftisskeið við tilsamans 100 undirvísingartímum. Eisini hava tey lisið bøkur og tilfar um leiðslu, fyrireika og lagt fram heimauppgávur. Tilsamans hava tey brúkt í minsta lagi 150 virknar tímar.

Føroya Ungdómsráð, sum er samstarvsfelagsskapur fyri barna- og ungdómsfelagsskapir í Føroyum, hevur staðið fyri útbúgvingini. Fyrireikingini hevur Kári Olsen, aðalskrivari í FUR, staðið fyri, og undirvísarar vóru Poul Jákup Thomsen og Elin Lindenskov.

Endamálið við útbúgvingini var at geva ungdómsleiðarunum í felagsskapum FURs betri fatan og kunnleika um teir týdningarmestu teoretisku fortreytirnar fyri leiðslu, og geva teimum møguleikan fyri á ein virknan hátt, at venja ymisk leiðsluamboð.

Vikuskiftisskeiðini vóru á Hotel Eiði. Fyrsta skeiðið var í desember 2000 og endað var við at skeiðsfólkini fingu handað prógv á seinasta skeiðnum í apríl 2001.